# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 28. august 2013, kl. $19^{00}$.

Borgarstjórin kunnaði um, at síðani skráin varð løgd, er eitt mál komið avtrat, sum skal viðgerast fyri afturlatnari hurð. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um loyvi at seta málið á skránna sum mál 36.
Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 30**
Tilmæli frá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini um dagførdar viðtøkur fyri foreldraráðið fyri Látipípuna.
J.nr. 2013-085

Trivnaðar- og umhvørvisnevndin viðgjørdi á fundi tann 21. august 2013 uppskot til dagførdar viðtøkur fyri foreldraráðið fyri Látipípuna.
Leiðslan í Látipípuni hevði heitt á Trivnaðar- og umhvørvisnevndina um at samtykkja at broyta viðtøkurnar fyri foreldraráðið í Látipípuni. Broytingarnar, talan er um, snúgva seg um at gera nevndarvalið lættari.

Nevndin samtykti at mæla bygdarráðnum til at samtykkja uppskotið til dagførdar viðtøkur fyri Foreldraráðið fyri Látipípuna.

**Viðv. 30**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 31**
Tilmæli frá Paula T. Petersen, borgarstjóra, um økt endurgjald fyri lendi til parkeringspláss á Byrgisvegi.
J.nr. 2013-046

Víst verður til fund tann 22. august 2013 millum Jákup Martin Andreasen, Paula T. Petersen, borgarstjóra, Hilbert Elisson, formann í Teknisku nevnd og Jákup Durhuus, tekniska leiðara um lendið, sum Vestmanna Kommuna hevur keypt frá Jákup Martin Andreasen fyri kr. 25.000.

Borgarstjórin mælir til at rinda Jákupi Martin Andreasen kr. 10.000 avtrat fyri lendið, sum Vestmanna Kommuna keypti frá honum til parkeringspláss á Byrgisvegi. Samlaði keypsprísurin fyri lendið verður sostatt kr. 35.000. Sostatt fær hann sama endurgjald samanlagt sum grannin fyri eitt øki, sum er tvífalt so stórt.

**Viðv. 31**
Tilmælið varð samtykt við 6 atkvøðum fyri og 1 ímóti.
Pauli T. Petersen, Hilbert Elisson, Malan Stórá, Durita á Heygum, Herit Magnussen og Karl A. Olsen at kvøddu fyri. John Zachariassen atkvøddi ímóti.

**Mál 32**
Tilmæli frá fíggjarnevndini um fyrispurning frá Kvívíkar Kommunu um at keypa part av røktarheimsplássum á Heiminum á Grønanesi.

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 22. august 2013 fyrispurning frá Kvívíkar Kommunu um at keypa part av røktarheimsplássum á Heiminum á Grønanesi.

Nevndin mælir til at geva Kvívíkar Kommunu eitt tilboð upp á at keypa røktarheimspláss á Heiminum á Grønanesi.

**Viðv. 32**
Eitt einmælt bygdarráð samtykti at áseta eindarprísin pr. búpláss til kr. 1.300.000 og at geva Kvívíkar Kommunu samsvarandi tilboð.

**Mál 33**
Tilmæli frá fíggjarnevndini um umsókn frá Áka Siggertsson Nielsen um loyvi til at flyta ognarrættin til grundstykki matr. nr. 282av.

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 22. august 2013 umsókn frá Áka Siggertsson Nielsen um loyvi til at flyta ognarrættin til grundstykki matr. nr. 282av aftur til pápan Siggert Nielsen, sum var upprunaligi eigarin av matr. nr. 282av.

Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 33**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 34**
Vísandi til kunngerð nr. 99 frá 5. juli 2013 um røktarheim og eldrasambýli skal Vestmanna Bygdarráð velja ein lim í felags upptøkunevndina fyri bæði eldrasambýli og ellis- og røktarheim fyri øki 2.
J.nr. 2013-051

Pauli T. Petersen, borgarstjóri, mælir til at velja Herit Magnussen til lim í upptøkunevndini.

**Viðv. 34**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.45.

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Hilbert Elisson

Malan Stórá Durita á Heygum Herit Magnussen John Zachariassen